# ítróttur

Nr. 200 • mikudagur • 22. oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Rundur føðingardagur í Hvalba

**Í morgin fyllir bóltfelagið Royn 80 ár og í Hvalba hava tey nógv at hátíðarhalda í ár. Og tað gera tey við veitslu í Roynhúsinum leygarkvøldið**

FØÐINGARDAGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Í 3. deild vann Royn ógvuliga sannførandi í ár. Liðið fekk heili 49 stig og tað, vit vita, er hetta tað mesta, nakað lið í vaksnamannadeildini hevur fingið. Sostatt flytir Royn upp í 2. deild næsta kappingarár. Mitt í rúgvuni stendur roynari nummar eitt, Mortan á Hòlalagnum, í ulpu. Hann hevur verið felagnum ein dyggur stuðul í ein mansaldur, bæði sum spælari og formaður. Nú er hann sjálvsagt heiðurslimur í felagnum og áhugin fyri felagnum er ikki minkaður*

Í hesum døgum hátíðarhalda tey rundan føðingardag í Hvalba.

Tað er tann savnandi megin í bygdini, bóltfelagið Royn, sum fyllir 80 ár í morgin og tað hátíðarhalda tey við stórari veitslu í Roynhøllini leygarkvøldið. Tekningarlistar liggja við Bakkhús og á Posthúsinum, men seinasta freist at tekna seg til veitsluna, er í kvøld. Og tey hava nógv at hátíðarhalda.

Umframt at felagið fyllir 80, eru tað eisini í morgin 30 ár síðani at Roynhøllin varð tikin í brúk.

Tað hevði leingi verið arbeitt við eini ætlan um at byggja eina høll í bygdini og tað skerst ikki burtur, at tað var ein kollvelting fyri felagið og bygdina, tá ið hon var liðug.

Á ítróttarliga økinum hevur felagið eisini nógv at hátíðarhalda:

Besta liðið hjá felagnum vann 3. deild ógvuliga sannførandi. Liðið misti bara fimm stig í allari landskappingini við tað, at tað bara tapti ein dyst og spældi ein javnan. Sostatt fekk Royn heili 49 stig í ár og so vítt vit vita, er hetta tað mesta, nakað lið í vaksnamannadeildini hevur fingið.

Samstundis gjørdust 5. deild hjá Royn eisini Føroyameistarar við at vinna 3-0 í finaluni.

Finalusigurin smakkaði ikki verri av tí, at hann júst var á arvafíggindanum av Tvøroyri, TB.

Somuleiðis vunnu vunnu smádreingirnir silvur í kappingini á hálvum vølli. Fyri fyrstu ferð, hevur Royn eisini havt eitt gentulið í kappingini í ár. Tað vóru gentur, sum eisini fingu rættiliga góð úrslit, eitt nú vunnu tær steypið í økiskappingini.

### Góðar vónir

Sum tann gløggi lesarin longu hevur roknað út, varð Royn sostatt stovnað í 1923.

Nógv størsti denturin hevur verið lagdur á fótbóltin, men eitt stutt skifti undir krígnum hevði Royn eisini hondbóltslið í kvinnudeildini.

Royn hevur eisini kappróðrarbát, sum tað eina árið lá heilt frammi í oddinum, men seinastu árini hevur tað verið so sum so við áhuganum fyri kappróðri og báturin hevur fyri tað mesta verið lántur út til onnur felag, men nógvar gentur úr Hvalba hava hinvegin róð við bátum av Tvøroyri.

Sostatt er tað enn fótbólturin, sum er miðdepilin í felagnum og har eru framtíðarvónirnar bjartar.

Onkuntíð hevur verið soltið við fólki, men í ár hevur liðið verið væl mannað við tað, at einir 24-25 mans hava mannað 3. deild í ár.

Leiðslan í felagnum sigur, at teir allarflestu verða verandi í felagnum næsta ár, men at tað verður eisini umhugsað at fáa onkran leikara til felagið, sum veruliga kann styrkja hópin, nú liðið skal royna seg í 2. deild, har kappingin er munandi harðari.

Í næstum verður eisini søkt eftir venjara til felagið fyri at brynja seg so væl sum gjørligt til næsta kappingarár.

Samstundis umhugsa Royn og TB eitt samstarv um eitt unglingalið næsta kappingarár og tað hevði ikki verið verrið fyri tey bæði feløgini.



*5. deild hjá Royn var Føroyameistari við at vinna sannførandi 3-0 á arvafíggindanum TB í finaluni*

## Todi stendur við orðini

**- Eg havi bara sagt mína meining. Meira er tað ikki, sigur álopsmaðurin, sum ikki ber nakran ótta fyri viðari revsing frá FCK.**

SKAÐI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum vit skrivaðu í gjár, so hevur Todi Jónsson í donsku bløðunum givið ilt av sær, tí hann ikki tykist fáa nóg skjóta viðgerð frá læknasektorinum í FCK. Serliga er tað tað, at hann nú skal bíða í 10 dagar eftir eini scanning upp á skaðan í lærkrikanum, sum hevur fingið ilt í leikaran. Ein bíðitíð, sum undir øllum umstøðum tykist leingja fráveru hansara frá besta liðnum.

Mánakvøldið fingu vit orðið á Toda, og hann tóktist á ongan hátt at vera bangin fyri at standa inni fyri tí, sum BT hevði borið fram. Heldur ikki, hóast slíkar útsagnir ofta hava fingið ilt í ítróttarstjóran í felagnum, Niels Christian Holmstrøm.

– Eg dugi ikki at síggja, at hetta skal kosta mær nakað í so máta, um tú hugsar um revsing av nøkrum slag. Fyri mítt viðkomandi er tað nóg stór revsing, at eg ikki fái tikið lut í dystunum hjá felagnum. Eg havi sagt mína hugsan um, at tað kundi gingið eitt sindur skjótari við hesum, og tað er so tað. Og í aðrar mátar, so plaga vit vanliga at greiða slíkt innanhýsis, so eg trúgvi ikki, at talan verður um nakað rok hesum viðvíkjandi, sigur Todi.

Í samrøðuni við BT róði Todi eisini uppundir, at tað fyri honum tykist, sum vil felagið ikki gjalda fyri at framskunda kanningina. FCK er annars uttan nakra samanbergin ríkasta felagið í Danmark. Plaga teir ikki vanliga at rinda tað, sum tað kostar, tá leikarar skulu kannast fyri skaðar?

– Tað veldst sjávlandi um, hvat slag av skaða talan er um, og hvør metingin hjá læknunum er. Í mínum føri kenni eg meg bara eitt sindur frustreraðan í løtuni. Fysioterapeutarnir hava staðfest, at talan ikki er um nakran skaða í vøddunum. Tí hava teir so spælt bóltin víðari til læknan, sum eisini hevur bílagt eina scanning. Men eg dugi ikki at skilja, hví eg so skal bíða í 10 dagar eftir hesari. Sum er fái eg ikki vant nakað serligt, og fyri hvønn dag sum gongur, gerst venjingarstøðan verri, soleiðis at eg førki meg alsamt longri frá besta liðnum. Tað er í øllum førum ein lítið hugalig støða. Ikki minst tá tað annars hevur gingist somikið væl seinastu longu tíðina.

Tá talan er um skaðar í lærkrikanum, so munnu tað vera fáir, sum hava havt fleiri trupulleikar við hesum enn júst Todi Jónsson. Tíðina í Lyngby og fyri ein part eisini í FCK var hann leingi plágaður av slíkum skaða. Er tað kanska óttin fyri eini endurtøku av hesum, sum eisini spøkir í høvdinum á Toda nú?

– Sjálvandi hugsar man eisini tann tankan, men vónandi er talan ikki um sama slag av skaða. Tann skaðan varð eg seinast skurðviðgjørdur fyri í 1997, so í so máta eri eg ikki so bangin fyri júst tí. Tað einasta eg vil, er at sleppa í dyst aftur fyri felagið hjá mær, so skjótt tað yvir høvur er gjørligt, staðfestir ein hugtungur Todi Jónsson at enda.

Men fyribils er ikki stórt annað at gera enn at bíða. Venjingarnar í FCK fær føroyski leikarin ikki tikið serligan lut í, annað enn at renna eitt sindur. Og í aðrar mátar vísa tol. Men nú er tolið tó um at vera uppi, skilst.







**Billyktirnar!**

**Koyrir tú í einum bili, sum ikki hevur ljósini í lagi, kanst tú lættliga elva til ferðsluóhapp.**

**Ert tú bilførari er ábyrgdin tín.**

**Ger tí tær og tínum medmenniskjum ein beina: kanna eftir, um perurnar lýsa og um ikki, fá tær skiftar út.**

**Frá 3. til 16. november ger politiið serligt átak at kanna bilar**

Sosialurin

Sosialurin

i



Jólaborðhald á Hotel Norð

**22. november og 13. december kl. 19.00** verður stór jólabuffet á Hotel Norð við meira enn 35 ymiskum heitum og køldum rættum

Undir borðhaldinum verður felagssangur við Heina Ziska og Jákup Marner Anthoniussen

Undirhald og skemt við Essa Jacobsen

Dansur verður aftaná.
22. november spælir Science Fiction

Bussur koyrir úr Klaksvík kl. 18.30 og kl. 23.00, og heimaftur eftir tiltakið.

Kostnaður fyri alt tiltakið: kr. 300,-
Einans dansur: kr. 100,-

Tilboð fyri alt tiltakið við gisting á dupultkamari:
kr. 500,- fyri hvønn

**Ring og bílegg borð á tel 451244 ella 217020**

Hotel Norð

Tel 451244 Fax 451245 FO 750 Viðareiði



Sosialurin 341800

**Málaraarbeiði**

Alt málaraarbeiði verður gjørt, bæði innan- og uttandura.

Tilboð verða givin av fakmanni, sera bíliga um alt landið.

**Málarafirma**
**v/ Egil Frederiksberg**
málarameistari
490 Strendur
Tlf. 223296

Lesið Sosialin

**Vága Javnaðarfelag**

**Útsetti aðalfundurin**
verður í húsinum hjá Miðvágs Arbeiðarafelag mánadagin 3. november kl. 21.00.

**Nevndin**

**Saltað seyðaskinn**

Vit taka ímóti saltaðum og ílignum seyðaskinnum frá mánadegnum tann 20. oktober til tann 01. desember 2003.

Móttøkustaður: Búnaðardepilin, Kollafjørður.

Gerandisdagar frá kl. 09.00 til kl. 17.00
Leygardagar frá kl. 09.00 til kl. 12.00.

MBM **Búnaðardepilin**
FO-410 Kollafjørður
Tlf. 479000 · Telefaks 479030


## Svimjing hjá SKEGGJUM 2003/2004

| Klokkan | Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag | Leygardag |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 10.00-11.00 | | | | | | **Lið 2 + útv. 3 |
| 11.00-12.00 | | | | | | **Lið 2 + útv. 3 |
| 12.00-13.00 | | | | | | Lið 1 |
| 13.00-14.00 | | | | | | Lið 1 |
| 14.00-15.00 | | | | | | ***Brekað |
| 16.00-17.00 | | *Skeggjar børn | | Lið 1 | | |
| 17.00-18.00 | | *Skeggjar børn | Lið 1. Av Leirvík kl. 17.00. Av Klaksvík kl. 20.45 | Lið 1 | | |
| 18.00-19.00 | Lið 2 | Lið 3 | | Lið 3 | | |
| 19.00-20.00 | Lið 2 og lið 1 | Lið 1 | | Lið 2 | Lið 2 | |
| 20.00-21.00 | Lið 1 | Lið 1 | | Lið 2 | Lið 2 og lið 1 | |
| 21.00-22.00 | | | | | Lið 1 | |

Tilmelding til Svimjifelagið fer fram í svimjihøllini í Gøtu

*Børn — Børn sum ikki klára seg sjálvi, skulu vera saman við vaksnum

**Lið 2 + útv. 3 — Søren og Súsanna, Í samráð við Oluffu, velja nakrar svimjarar úr lið 3, sum sleppa at venja við lið 2. Bert galdandi fyri hesar tímar!

***Brekað — Skulu tekna seg á telefon 21 19 92. Um ikki nóg nógv tekna seg, fellur tímin burtur!

Venjari til lið 1, er Søren Olsen, telefon 211992
Venjari til lið 2, er Súsanna Mørkøre, telefon 441001 ella 441002 og Søren Olsen telefon 211992
Venjari til lið 3, er Oluffa á Høvdanum, telefon 442122 ella 260260
Venjari hjá Skeggjar børn er Sædis Eilifsdóttir, telefon 441536

Korttelefon í gongini, telefon 441758
Svimjihøllin telefon 441477 (kann ikki ringja út)

**Skeggjar er framtíðin**

1992 SKEGGJAR